## Kláraði misálit

Andstøðan í grønlendska Landstinginum er so misnøgd við avgerðina hjá landsstýrinum at útseta eitt uppskot um nýggja fiskiveiðilóg, at í gjár legði hon eitt uppskot um misálit á landsstýrismannin í fiskivinnumálum fyri Landstingið. Men uppskotið fall við 11 atkvøðum ímóti 12. Fleiri tinglimir vóru ikki á fundi, tí teir vóru í øðrum politiskum arbeiði. Í í slíkum føri verður atkvøtt soleiðis, at úrslitið vísir javnvágina millum samgongu og andstøðu.



## Nei til fólkaatkvøðu

Í Grønlandi halda summi, at ætlanin hjá amerikonsku fyritøkuni Alcoa at byggja eitt aluminiumsverk og eitt vatnorkuverk er so stór, at landsstýrð sigur at halda fólkaatkvøðu um hana. Men tað verður av ongum, sigur Siumut. Lars-Emil Johansen, sum er politiskur framsøgumaður hjá flokkinum, sigur, at ein fólkaatkvøða um Alcoa hevði gjørt, at grønlendingar skuldu á fólkaatkvøðu nógv onnur mál so sum oljuleiting og gullleiting.

# Tá USA tapti kríggið í Vietnam

**Í dag eru 40 ár liðin síðani blóðbaðið í My Lai. Í søguni stendur 16. mars 1968 sum dagurin, tá USA tapti Vietnam-kríggið. Tí hendan dagin framdi ein amerikonsk herdeild eina ræðuliga skemdargerð, sum er ein svartur dagur í bæði amerikanskari og vietnamesiskari søgu**



*Hópdrápið í bygdini My Lai fyri 40 árum síðani var dropin, sum fekk bikarið til at flóta yvir hjá bæði vietnamesarum og umheiminum. Tann dagin taptu amerikanarar kríggið*



*Kríggið í Vietnam kostaði fimm miljónum vietnamesarum og 58.000 amerikanskum hermonnum lívið*



*Vietnam-kríggið var ræðuligt fyri fólkið í Vietnam*

KRÍGSSØGA
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*
*Myndir: Getty Images*

16. mars í 1968 lendi ein herdeild við 100 amerikonskum hermonnum uttanfyri vietnamesisku bygdina My Lai. Uppgávan hjá teimum var at niðurberja kommunistiskar partisandeildir, men tá dagurin var liðin var hesin málsetningurin farin av sporinum. Amerikanskir hermenn høvdu tvær ferðir áður vitja í bygdini, tá høvdu amerikanarnir fingið ein vatnsopa frá bygdarfólkunum, og amerikonsku hermennirnir høvdu givið teimum vaksnu sigarettir, og børnunum sukurlátu. Amerikanski hermennirnir høvdu eisini givið heilivág til tey sjúku í bygdini. Men soleiðis fór tað ikki at verða hendan sorgardagin.

### Galið beinavegin

Íbúgvarnir merktu beinanvegin, at hendan vitjanin fór ikki at verða, sum tær báðar fyrru. Tað gekk galið beinavegin, tá ein bóndi rætti sínar hendur út fyri at vísa, at hann ikki hevði nakað vápn uppiá sær. Bóndin small til jarðar, gjøgnumtærdur av maskinbyrsukúglum. Sum bóndin søkkur til jarðar byrjar amerikanska herdeildin at skjóta eftir øllum, sum rørdi seg, fuglar, høsn, neyt – og menniskju. Ræðslusligin í panikki flýggja bygdarfólkini út á rísmarkirnar, ella inn í sínar smáttir. Fleiri verða skotin til deyðis, meðan tey royna at flýggja.

### Einki eftir

Dagin fyri, tann 15. mars í 1968 hevði hernaðardeildin fingið boð frá ovastanum, Ernest Medina, at teir skuldu finna og niðurberja Vietcong-deildirnar, og øll tey, sum vóru í parti við teimum. “Tá tit fara úr bygdini, skal tað ikki verða nakar, sum kann standa ella ganga eftir, og har skal ikki verða nakað, sum kann vaksa ella grógva!” vóru harðrendu boðini frá Ernest Medina til hernaðardeildina. Hernaðardeildin kom at verða kend undir navninum “Charlie-deildin”. Tá Calley, loytnantur og hansara menn komu til bygdina, vóru bara eldri fólk, kvinnur og børn í bygdina. Eingin maður í vápnaførum aldri var at síggja nakrastaðni. Calley, loytnantur var ikki í iva, mennirnir í My Lai vóru burturstaddir, tí teir bardust fyri Vietcong, og tí var bygdin ein støð hjá Vietcong-partisanunum. Mennirnir í herdeildini settu bajonets-knívar á byrsurnar, og teir gingu frá smáttu til smáttu, og stungu fólk niður. Í summum førum blakaðu teir hondgranatir inn í smáttirnar. Ræðuleikarnir tóku til, og eingin endi var á óndskapinum.

### Sær ræðuleikan

Ì luftini uppi yvir bygdini fleyg ein 24 ára gamal flogskipari, Hugh Thompson við tyrlu sínari. Forfardur sær hann blóðbaðið, sum Charlie-deildin er í holt við. Í eini roynd at steðga blóðbaðnum lendir Thompson tyrluna hjá sær millum nakrar hermenn, og eitt trygdarrúm, har nakrir vietnamesar royna at goyma seg. Í síðstu løtu eydnast tað Hugh Thompson og hansara monnum at bjarga uml. 15 særdum og bløðandi vietnamesarum umborð á tyrluna. Tá komið er út ímóti middegi tagna vápnini. Teir 100 hermennirnir í Charlie-deildini taka seg úr bygdini, sum er brend niður, og alt lív er týnt. 500 kvinnur, børn og eldri fólk eru dripin í ræðuliga blóðbanum. Einasti maðurin í Charlie-deildini, sum hevur fingið skaða, er ein hermaður, sum kemur at skjóta seg sjálvan í fótin, tá hann skal reinsa eina pistól.

### Ridenhour fekk sannleikan fram

Teir, sum høvdu ábyrgd av blóðbaðnum royndu at dylja sannleikan fyri amerikonsku fjølmiðlunum, og amerikanska almenninginum. Men ein samvitskufullur hermaður vildi tað øðrvísi. Ronald Ridenhour var byrsumaður umborð á einari tyrlu. Tá hann hoyrdi um ræðuliga blóðbaðið í My Lai fór hann í holt við at savna vitnisfrásagnir. Ridenhour fekk alsamt fleiri vitnisfrásagnir fráskuldartyngdum hermonnum. Men hann møtti eisini forskrúvaðum hermonnum í Charlie-deildini, sum vóru “stoltir” yvir tað teir høvdu gjørt. Aðrir greiddu Ridenhour frá, at teir ikki vildu taka lut í blóðbanum, og at teir høvdu verið háðaðir afturfyri. Tá Ridenhour var liðugur við sína hernaðartænastu í Vietnam fór hann heim til USA, og her byrjaði hann at skriva brøv.

Eitt ár eftir blóðbaðið – í mars 1969 – skrivar hann á trimum síðum, um ræðuleikarnar í My Lai í høvuðsheitum.

### Okkurt byrjar at henda

Nú byrjaði nakað at henda. Calley, loytnantur bleiv fongslaður í september í 1969 ákærdur fyri morð á sivilar vietnamesarar. Nú var pressan við, Time, Life, Newsweek og allir teir stóru fjølmiðlarnir prentaðu og sendu tilfar um ræðuleikarnir í My Lai. Nú vendi stemningurin í amerikanska fólkinum, og trýstið frá amerikanska almenninginum at taka seg aftur úr Vietnam bleiv alsamt størri. Serliga sjónvarpsmyndirnar gjørdu sítt til, at fólkið vendi sær ímóti krígnum. Og í 1972 vóru ongar amerikanskar land-hernaðardeildir eftir í Vietnam, tá máttu suður-vietnamesisku herdeildirnar berjast einsamallar ímóti norður-vietnamesarum. Tann 30. apríl í 1975 sigraði tað kommunistiska Norður-Vietnam tá teir tóku suður-vietnamesiska høvuðsstaðin Saigon. Bert ein frá Charlie-deildini bleiv dømdur, og var tað William Calley, loytnantur. Men tá saman um kom sat Calley bert 3 ½ ár í húsavarðhaldi, leyslatin fór Calley at arbeiða í gimsteinshandlinum hjá verfaðirinum. Varnado Simpson og aðrir frá Charlie-deildini føla seg sekar til hendan dag fyri ræðuleikarnar, sum hendu tann 16. mars í 1968. Simpson drap sjálvur 25 fólk, og sigur seg hava tað ræðuligt av tí, sum hendi í My Lai, og at hann kennir stóra skuld. Ernest Medina, ovasti sum hevði evstu ábyrgd av boðunum, sum vóru givin bleiv frídømdur, tí hann var ikki á staðnum, tá ræðuleikarnir fóru fram! Vietnam vann kríggið, men tað kostaði fimm miljónum vietnamesarum lívið, 58.000 amerikanskir hermenn lótu lív undir Vietnam-krígnum.